

# Oljuframleiðslan í Norra minkað í helvt síðani 2000

**Jan Müller**

04.01.2014 - 22:48

Oljan.fo

Eftir tríggjar ársfjórðingar í 2013 endaði norska oljuframleiðslan við eini minking uppá 6,3% í mun til sama tíðarskeið í 2012. Hetta upplýsir norska Oljedirektoratet.

Ein av orsøkunum til minkingina vóru trupulleikar á framleiðandi feltunum Grane og Valhall. Eisini var framleiðlsan á Ekofisk steðgað orsakað av umvælingum eitt tíðarskeið.

**Søguliga sæð er oljuframleiðslan í Norra, sambært Teknisk Ugeblad minkað síðani 2000. Framleiðslan er minkað, hóast tað í dag eru 72 framleiðandi felt í mun til 34 felt í 2000.**

Kortini fara stórar oljukeldur sum Johan Sverdrup at broyta hetta. Hartil er eisini at siga, at fleiri nýggjar keldur eru farnar undir framleiðsluí 2013, eitt nú Hyme, Jette, Skarv og Skuld.

**Søgan er tó ikki tann sama fyri gass. Norra byrjaði sína gassframleiðslu í 1977.** Síðani er hon vaksin hvørt ár, tó at hon er minkað aftur í 2013.

Ein av orsøkunum er tann, at Snøhvit varð stongt partar av 2013, umframt at Skarv og Troll hava havt trupulleikar.

**Hagtølini vísa eisini, at framleiðslan av gassi hevur yvirhálað oljuna munandi, soleiðis at gass stóð fyri umleið 50% allari kolvetnisframleiðslu í Norra í fjør, meðan oljan stóð fyri 40%. Fyri ár 2000 vóru tølini 19,4 til gass og 75,6% til olju.**

Í fjør vóru 64 felt, sum framleiddu gass.